**UTTAN ÚR HEIMI**

## Neyðtøkulógin skal broytast

Danski serfrøðingurin í revsirætti, Vagn Greve, professari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, heldur, at myndugleikarnir eiga at broyta tann partin av revsilógini, sum snýr seg um neyðtøku.

Vagn Greve vísir á, at fleiri ferðir er tað hent, at menn eru vorðnir fríkendir fyri neyðtøku tí kvinnurnar hava verið so bangnar, at tær hava ikki torað at sett seg upp ímóti teimum. Sjálvt um talan kann vera um neyðtøku, verður maðurin fríkendur, tí hann skilti ikki, at kvinnan vildi ikki. Vagn Greve nevnir sum eitt dømi, at í einum føri varð ein maður fríkendur fyri at hava neyðtikið eina grønlendska kvinnu. Kvinnan hevði sagt nei, men á grønlendskum, og tað skilti maðurin ikki.

Professarin vísir á, at í nógvum øðrum revsiviðurskiftum verða fólk dømd fyri at hava framt brotsverk av ósketni. Hann heldur, at hetta kann eisini nýtast í sambandi við neyðtøku.

## 80 fólk druknaðu

Í minsta lagi 80 fólk druknaðu, tá eldur kom í eitt skip, sum var á veg úr Somalia til Jemen. Myndugleikarnir siga, at skipið rak fyri vág og vind í átta dagar, áðrenn hjálpin kom fram.

Skipið var fult av fólki úr Etiopia og Somalia, sum skuldu til Jemen ella Saudiarabia. Vanlukkan hendi tann 4. januar, og hon er tann ringasta av sínum slagi í Adenvíkini ankrantíð.

ST-talsfólk í økinum siga, at 23 fólk sluppu frá vanlukkuni á lívi. Tey hava greitt frá, at eldurin kyknaði í maskinrúminum og breiddi seg til at kalla alt skipið. Nógv av ferðafólkunum gjørdust ræðsluslígin og lupu í havið, har tey druknaðu.

## Russland biður um hjálp

Seinastu mánaðarnar hevur áhaldandi og ógvusligur kuldi kravt fleiri hundrað mannalív í Russlandi, og nú hava russisku myndugleikarnir biðið Noreg um hjálp ímóti tí nógva kuldanum.

Norski Reyði Krossur sigur, at russar hava biðið um teppi og annað, men felagsskapurin ætlar eisini at savna pening til at umvæla miðstøðuhitan í barnagørðum og ellisheimum í Russlandi.

Kuldin hevur verið serliga nógvur har vesturi í Russlandi, og í vikuni sendi norski Reyði Krossur 400 teppi og ymsa aðra útgerð til landspartin Karelia tætt við finska markið. Har hevur tað fryst meiri enn 30 stig í seinastuni. Tað er meiri enn vanligt, og tí eru fólk har ikki fyrireikað til tann nógva kuldan.

†

**Johanna Samuelsen**
vanliga nevnd Lilla, Tórshavn

andaðist týsdagin 14. januar, 97 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**

Tey, ið vilja minnast Lillu, kunnu lata Frelsunarherinum eina peningagávu, konto í peningastovnunum!

# Belgia sinnað at loyva rættarmáli ímóti Sharon

**Belgiski forsætisráðharrin, Guy Verhofstadt, tekur undir við at broyta landsins mannarættindalóg. Ein broyting fer at gera tað møguligt at fara undir eitt rættarmál, har ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, er skuldsettur fyri krígsbrotsverk**

RÆTTARSÓKN
*Árni Joensen*

Í juni í fjør sýtti ein belgiskur dómstólur fyri at viðgera rættarmálið ímóti Ariel Sharon, tí sambært dómstólinum kundi málið ikki viðgerast uttan so, at tann ákærdi var staddur í Belgia.

Málið snýr seg um krígsbrotsverk, og tað eru fólk, sum sluppu livandi frá hópdrápinum í palestinsku flóttafólkalegunum Sabra og Shatila í 1982, sum hava reist málið. Millum 800 og 2.000 flóttafólk vórðu fyribeind.



*Ariel Sharon, sum roynir at verða afturvaldur til forsætisráðharra, heilsar her upp á mótvalevnið, Amram Mitzna, úr Arbeiðaraflokkinum*

*Mynd: Reuters*

Hálvhernaðarligir libanar myrdu flóttafólkini, men tað var ísraelski herurin, sum loyvdi álopsmonnunum inn í tær báðar flóttafólkalegurnar, og ísraelskir hermenn stóðu á varðhaldi kring legurnar, meðan hópdrápið fór fram. Ariel Sharon var tá ísraelskur verjumálaráðharri, og hann varð noyddur frá, eftir at ein kanning hjá ísraelsku stjórnini hevði staðfest, at hann óbeinleiðis hevði ta persónligu ábyrgdina av tilburðinum.

Í mai í fjør dømdi ein belgiskur dómstólur fýra fólk, teirra millum tvær nunnur, sekar í medvirkan í hópdrápinum í afrikanska landinum Rwanda, har umleið 800.000 fólk vórðu myrd fyri níggju árum síðani.

Tey fýra kundu dømast, tí tey høvdu valt at búseta seg í Belgia. Nú sigur Guy Verhofstadt, at hann er sinnaður at broyta lógina, soleiðis at dómsvaldið eisini kann døma fólk, sjálvt um tey ikki eru stødd í landinum, sama hvar tey framdu brotsverkið, og sama hvønn tjóðskap tey hava. Fólk sleppa heldur ikki at fjala seg aftan fyri diplomatiskt órin.

# 17 ára gamal kann fáa deyðarevsing

**Rætturin í Virginia í USA hevur gjørt av, at ein 17 ára gamal drongur, sum er ákærdur fyri morð, skal metast sum vaksin. Hann kann tí fáa deyðarevsing**

DEYÐAREVSING
*Árni Joensen*

Tann 17 ára gamli drongurin John Lee Malvo var annar av snigskjúttunum, sum í oktober í fjør herjaðu leiðina kring høvuðsstaðin Washington.

Tíggju fólk doyðu, og fýra vórðu illa løstað av skotum teirra, áðrenn tað eydnaðist løgregluni at taka teir.

Sambært løgregluni í statinum Virginia skjeyt tann 17 ára gamli minst fýra av teimum tíggju, sum doyðu. Hini skal tann 42 ára gamli John Allen Muhammad hava skotið.

Mikudagin avgjørdi rætturin í Virginia, at tann 17 ára gamli drongurin kann metast at vera vaksin. Hesin úrskurðurin ber í sær, at drongurin kann fáa deyðarevsing, verður hann funnin sekur.

Deyðarevsingin fær nógva umrøðu í USA í hesum døgum, eftir at guvernørurin í statinum Illinois gjørdi av at ógilda deyðadómarnar hjá 167 fangum. Ístaðin fingu teir lívlanga fongsulsrevsing.

# Olja rennur framvegis úr Prestige

**Spania vil nú hava ES at gjalda rokningina fyri arbeiðið at rudda tær oljudálkaðu strendurnar. Fyribils er rokningin 7,3 milliardir krónur. Og enn rennur olja úr tí sokna skipinum**

OLJUDÁLKING
*Árni Joensen*

Spanski fíggjarmálaráðharrin, Cristobal Montoro, almannakunngjørdi í gjár rokningina fyri arbeiðið at taka upp olju, sum er likin úr tí sokna tangaskipinum Prestige. Ráðharrin sigur, at teir pengar, sum higartil eru játtaðir, røkka bara til at rudda burtur ta oljuna, sum higartil er komin upp á land, og at pengarnir fara als ikki at røkka til tað arbeiðið, sum kann liggja fyri framman. Hildið verður, at umleið 53.000 tons av olju eru eftir í tangunum á tí sokna skipinum.

Fyrr í vikuni var tann serútgjørdi franski kavbáturin Nautilus niðri hjá vrakinum og tetti eitt av holunum. Sambært myndugleikunum eru tólv hol nú tett, men framvegis rennur olja ígjøgnum átta onnur hol í skrokkinum.

Prestige sakk tann 19. november, eftir at tað hevði rikið mannaleyst í illveðri í seks samdøgur. Hildið verður, at eini 25.000 tons av olju eru likin úr tangunum higartil og hava dálkað sponsku útnyrðings- og norðurstrondina so illa, at fleiri túsund fiskimenn eru vorðnir arbeiðsleysir.

Seinastu tveir mánaðarnar hava fleiri túsund sjálvboðin og hermenn roynt at rudda sponsku strondina. Eisini á fronsku útsynningsstrondini er olja rikin upp á land.






# 30 raðhús á Løgmannabreyt

**SH-smíð fer nú í holt við at byggja 30 raðhús niðast á Løgmannabreyt í Hoyvík. Vegarbeiðið er byrjað og væntandi verða tey fyrstu húsini klár seinast í hesum árinum**

BYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Hanus Olsen, byggimeistari frá SH-smíð, fer nú í holt við at byggja 30 raðhús niðast á Løgmannabreyt. Plantekningarnar eru góðkendar av býráðnum, ognin keypt og vegarbeiðið er byrjað.

Tey minstu húsini fara at vera um 115-120 fermetrar, men nøkur fara at verða størri við onkrum skeivum vinklum. Húsini verða í tveimum hæddum. Innitekningarnar eru ikki rættiliga lidnar enn, men arbeitt verður við teimum nú.

– Prísurin er ikki fastlagdur enn, men fara tey at liggja um 1,15 milliónir krónur, sigur Hanus Olsen við Sosialin.

So skjótt sum byggibúgvingin er liðug verður farið undir at byggja, og vantandi verða tey fyrstu húsini klár seinast í hesum árinum.

Útstykkingin í Hoyvíkshaganum:

# Tilboðini latin upp

**Fyrst í vikuni vórðu tilboðini um útstykking í Hoyvíkshaganum suður latin upp. Arbeiðið varð bjóðað alment út, og nú er verkfrøðingastovan hjá Magnus Paula Gaard farin at hyggja nærri eftir tilboðunum**

ÚTSTYKKING
*Ingrid Bjarnastein*

Tilboðini til størstu útstykking í Føroyum nakrantíð eru nú latin upp. Útstykkingin í Hoyvíkshaganum-suður varð í fjør latin býráðnum, og varð arbeiðið tá bjóðað alment út. Nú eru tilboðini komin inn, og fer verkfrøðingastovan hjá Magnus Paula Gaard nú at hyggja nærri eftir teimum.

– Tað lægsta boðið var 27,5 milliónir, meðan tað hægsta var slakar 40 milliónir krónur, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

– Nú gjøgnumgongur verkfrøðingastovan tilboðini, og tilmæli verður síðani latið býráðnum um, hvat tilboð vit skulu velja.

Tað er rættiliga vanligt, at lægsta tilboðið verður valt, alt eftir um tað lýkur øll krøv.

– Nú verður hugt eftir, hvørt útbjóðararnir hava givið okkum eitt realistiskt tilboð og um teir klára at yvirhalda alt tað teir skulu. Tað verið seg tíðarætlan og annað.

Tey seks feløgini, ið hava givið eitt tilboð eru: P/F J&K Petersen og P/F Byggitek – 27,5 milliónir, P/F H.V. Lützen – 29,7 milliónir, P/F Articon – 29, 8 milliónir, Sp/f JKH Entreprenørar – 30,3 milliónir, M.T. Højgaard – 39,7 milliónir og P/F Guttesen & Staksberg – 40 milliónir krónur.

Harafturat høvdu Articon og M.T Højgaard givið eitt sokallað alternativt tilboð.

Arbeiðið umfatar útstykking til 175 sethús og samanbygd hús. Nær útstykkingin fer ígongd er ikki greitt enn.

# Pól Arni fer í regnið



**All That Rain hevur nú fingið ein nýggjan forsangara. Hann eitur Pól Arni Holm. Hans Ravnsfjall, sum kom fyri Jens Marna Hansen, fer nú bara at spæla gittara**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Forsangaraskifti er í All That Rain. Hans Ravnsfjall, sum hevur sungið í All That Rain í eitt gott ár, leggur nú mikrofonina frá sær, og fer at halda seg til gittaran.

– At blíva fýra ístaðin fyri tríggir er nakað, sum vit hava ætlað leingi, sigur Henning Nicodemussen, trummuspælari í All That Rain.

– Og hetta er nakað, sum vit allir eru sera glaðir fyri.

Fyribils veit bólkurin ikki nær hann fer aftur á pallin. Nú snýr tað seg fyrst og fremst um venjing.

– Av tí at Pól Arni býr í Suðuroynni, so verður bert møgleiki at venja um vikuskiftini.

Enn eru ongar ítøkiligar ætlanir á borðinum. Hans er fyri stuttum komin aftur úr Danmark, har hann hevur verið í skúla. Á heimasíðuni hjá bólkinum stendur at lesa, at í løtuni verður arbeitt við tilfari, og møguliga verður onkur konsert aftur á skránni í mars mánað. Og kanska kunnu vit eisini vænta eina fløguútgávu seinni í árinum.